# Owen bjargaði Onglandi

Við tveimum málum frá Michael Owen legði Ongland lunnar undir tryggan 3-0 sigur á Russlandi í gjárkvøldið. Skuldi Ongland gera sær vónir um at spæla seg víðari til endaspælið, so var sigurin á Russlandi eitt krav, og longu eftir hálvum tíma hevði Owen lagt lunnar undir sigurin. Eftir steðgin hevði Ongland tamarhald á tí mesta, og stutt fyri leiklok kundi Rio Ferdinand skora til endaliga úrslitið. Ongland er tó framvegis trý stig aftan fyri Kroatia, men enn restar heimadysturin móti júst Kroatia.



# FM í einkultstarti

Leygardagin 15. september skipar TSF fyri FM í einkultstarti fyri børn og vaksin. Børnini koyra kapp í Kaldbaksbotni og børnini koyra ein tein, ið svarar til teirra aldursbólk, tvs. millum 2 og 6 km. Tey vaksnu koyra teinin Kollafjørð - Rundkoyringina við Streymin - Kollafjørð. Hesin teinur er 40 km og er royndur fleiri ferðir fyrr. Kvinnurnar koyra 20 km og hesin teinur er Kollafjørð - Áir - Kollafjørð. Startur og mál er við víkiplássið miðskeiðis í Kollafirði.Kappingin hjá teimum vaksnu byrjar kl. 15.00 og børnini koyra kl. 17.00.

# Aldri spælt á hasum plássinum

**Hóast Jákup á Borg ikki fekk boðini um óvandu støðuna sum vinstri bakkur fyrr enn mikumorgunin, so tóktist hann ikki serliga órógvaður av. Eitt sindur av svøkum tónleiki var nóg mikið til at fáa gearini á rætta kós, áðrenn farið varð á vøllin, sigur hann**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Nei. Tað er nokk eitt av teimum fáu støðunum á vøllinum, sum eg ongan tíð havi spælt áður, var svarið frá Jákupi, tá hann varð spurdur um hann nakran tíð hevði roynt seg sum vinstri bakkur í fótbólti.

Boðini um, at fyrsta royndin í so máta varð móti Litava, fekk hann mikumorgunin. Men sjálvur helt hann tó ikki, at hetta órógvaði fyrireikingarnar hjá honum til dystin so øgiliga nógv.

- Nei, tú fyrireikar teg jú kortini. Fyrst og fremst, so er tað jú tað, at tú umboðar landið. Og so tekur man tað í stívum armi og lurtar eftir eitt sindur av svøkum tónleiki. So ert tú klárur til tað.

Og tá alt kom til alt, so gjørdist tað ikki verri enn ilt hjá Jákupi. Heldur ikki, hóast hann tóktist eitt sindur tyngdur av óvandu støðuni fyrstu løtuna.

- Fyrst og fremst, so ivaðist eg at byrja við í, nær eg skuldi pressa upp. Gjørdi eg tað ov nógv, so kom ein maður rennandi í tómrúmið aftanfyri, men eg haldi, at eftir fyrsta korterið ella so fann eg eina javnvág í hesum. Og tá verjuparturin so riggar, so verður jú lættari at spæla.

Og tað sá eisini út til, at tú í seinna hálvleiki betri tordi at koma framvið?

- Ja, men tá var bara ikki eins gott pláss at trekkja inneftir, sum tað var í fyrra hálvleiki. Men so hvørt, sum sjálvsálitið bleiv betri, so tordi eg meira og meira.



*Hóast boðini um óvæntaða plássið ikki komu fyrr enn mikumorgunin, so helt Jákup á Borg ikki, at hann hevði stórvegis ávirkan á hansara hátt at fyrireika seg til dystin*

## Jákup var fremsta valið

Tað tók tey flestu á bóli, at Jógvan Martin Olsen setti Jákup á Borg á vinstra bakk mikukvøldið. Allar venjingar undan dystinum bendu annars á, at Johan Troest Davidsen skuldi røkja sessin, men hetta hevði sína frágreiðing, segði Jógvan Martin eftir dystin.

- Jákup er farin um teir 50 dystirnar mær vitandi, so hann skal ikki nýta tí stóru tíðina fyri at gera seg kláran til ein dyst. Men skuldi tað hent, at Jón Rói ikki varð tøkur í dag, so vildi eg geva Johan nóg stórt álit, soleiðis at hann var til reiðar at traðka beint inn á liðið.

So Jákup var kanska alla tíðina tann spælarin, sum var fremstur í tonkunum til plássið?

- Ja, tað var hann. Eisini hóast hann ikki er vanur at spæla á tí plássinum. Við royndunum, sum hann hevur, so roknaði eg við, at hetta var skilabetri, enn at geva Johan sína debut á einum plássi, sum hann ikki er vanur at røkja. Og harvið kanska geva honum eina keðiliga fyrstu uppliving á landsliðnum. Tað eru í øllum førum viðurskifti, sum tú eisini mást hava í huga í slíkum førum, heldur Jógvan Martin.

**-mørk**



*Sjálvur var Súni ikki nøgdur um sítt egna avrik, og hann helt eisini, at liðið átti at fingið meira burtur úr tí, sum skapt varð*

# Ikki nøgdur

**Súni Olsen viðgongur, at tað er um at gerast eitt irritatiónsmoment hjá føroyska liðnum, at ov fá mál fáast burtur úr møguleikunum, sum verða skaptir**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Súni Olsen var skjótur at staðfesta, at talan ikki var um besta landsliðsavrikið frá hansara síðu mikukvøldið. Fleiri ferðir í seinastuni hevur hann annars víst landsliðsfótbólt í nærum heimsflokki, men í Kaunas vildi hetta ikki veruliga rigga.

Seinastu tíðina hevur Súni spælt millum lítið og einki á besta liðnum hjá AaB. Og hetta hevur kanska eisini havt sína ávirkan á spælið, helt hann.

- Tað hevur tað kanska havt. Eg helt ikki, at mótstøðan var so hørð í dag, sum hon onkra tíð hevur verið. Men har vóru ov nógvar skeivar sendingar og ov nógvir feilir. Tíbetur løgu horna- og frísparkini tó hampuliga væl, og í øllum førum eitt teirra var heilt nær við at geva mál. Men eg var ikki nøgdur um avrikið hjá mær hesaferð. Og so er væl ikki so nógv annað at siga um tað.

Tú varð skiftur út í seinna hálvleiki. Var hetta ein avleiðing av, at orkan var uppi?

- Nei, tað vil eg ikki siga. Eg var ikki deyðatroyttur, men kanska vildi venjarin hava betri tak á miðvøllinum við at seta Paula inn, tí hann er meira verjukendur enn eg. Og var tað ætlanin, so er tað eisini nakað, sum eg góðtaki.

Og eftir ein slíkan dyst, so er tað væl bara hart arbeiði, sum er leiðin fram?

- Tað er tað helst. Tað vísir so ofta, at vit spæla væl móti teimum stóru tjóðunum, fyri so at dumma okkum móti teimum, ið ikki eru heilt so sterk. Og tað gera vit so eisini í dag. Málini, sum teir fáa, eru eftir verjuvillur, sum tú nóg illa sært í piltadeildini. Tey eru snøgt sagt ov nemm. Og tað skulu vit ikki góðtaka.

Men tit skapa so eisini tykkara møguleikar hesaferð. Er tað blivið so, at spælarar verða nervaðir av, at ov fá mál spyrjast burturúr?

- Ja. Enn einaferð fáa vit fleiri møguleikar. Og tað er ikki frítt, at vit byrja at irriterast um tað. Men eg rokni við, at fyrr ella seinni, so fáa vit eisini gongd á tann partin. Men akkurát nú eru vit ikki nóg effektivir, tá tað ræður um at avslutta. Men tað verður kanska móti Fraklandi!